# Øll valdømi krevja landsstýrissessin

**Nógv áhugamál eru uppií, nú løgmaður skal tilnevna ein nýggjan landsstýrismann, og helst spælir tað nógv inn, hvørjum valdømi, tey skikkaðu uppskotini eru úr**

TILNEVNING
*Ingi Rasmussen*

Smáar tvær vikur eru farnar, síðan Jørgen Niclasen noyddist at leggja frá sær sum landsstýrismaður við fiskivinnumálum. Løgmaður umsitur málsøkið, til ein avloysari er funnin, men enn er onki nýtt navn sett á.

Nógv áhugamál eru uppií, sigur løgmaður, sum er undir stórum trýsti frá øllum lokalfeløgunum, ið vilja hava nýggja landsstýrismannin. Løgmaður viðgongur eisini, at tað kann fáa týdning fyri valið, hvat valdømi landsstýrismaðurin hoyrir til, tá hann tekur avgerðina.

Suðuroyingar hava áður kent seg fyri vanbýti, tá sessarnir í landsstýrinum skuldu býtast, og tað er ikki óhugsandi, at teir sleppa upp í part hesaferð. Men tað kann eins væl vera onnur, sum vinna tað taktiska spælið.

Løgmaður vil ongan dato seta á, nær ein nýggjur landsstýrismaður er funnin, men tað verður skjótt, sigur hann.

– Tað verður tikin tann tíð, sum er neyðug, men løgmaður kann ikki sita leingi við fiskivinnumálum, tí hetta er eitt tungt málsøkið, sum krevur sín mann og reiðiliga tað, sigur Anfinn Kallsberg.

# Slitið samstarv kann slitna



*Sárini eftir seinastu hólmgonguna í samgonguni eru ikki lekt enn, og bæði Anfinn Kallsberg løgmaður og Jørgen Niclasen landsstýrismaður eru ivingasamir um, hvørt samgonguni er lív lagað*

**Taka samgongupartarnir ikki annað skinn um bak, so er ikki óhugsandi, at samgongan slitnar, sigur Anfinn Kallsberg løgmaður. Hann heldur samgonguna byggja á eitt gott grundarlag, men nógvu almennu hólmgongurnar eru slítandi og ein vánaligur gróðrarbotnur fyri fruktagóðum politikki. Uttanumfríggj kennir hann onki til**

POLITIKKUR
*Ingi Rasmussen*

Um ikki annað lag kemur á, so er spurningurin, hvussu leingi samstarvið fer at halda.

Soleiðis sigur Anfinn Kallsberg løgmaður eftir djúpu sárini, sum samgongan fekk eftir orrustuna um landsstýrismannin við fiskivinnumálum, sum við ringum tannabiti mátti leggja frá sær.

Óneyðugt er at siga, at bardagarnir hava verið nógvir síðstu árini. Dúgliga hevur verið gitt um, hvørt politiska hjúnalagið millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin fór at halda. Men tað hevur víst seg at vera ynskishugsan hjá andstøðuni, tí hvørja ferð ein brotasjógvur er farin framvið, hevur samgongan staðið líka stinn. Ella stinnari.

Seinasta rokið um uppsøgnina hjá Jørgen Niclasen fekk ikki løgmann at siga samgonguna upp, men sambært høvuðspersóninum sjálvum, er tað bert ein spurningur um tíð, áðrenn tað hendir.

– Samstarvið við Tjóðveldisflokkin er so slitið, at talan bert kann verða um tíð, áðrenn tað av álvara slitnar. Spurningurin er bert, nær tað slitnar, og ikki um tað slitnar, sigur Jørgen Niclasen við Dimmalætting 18. januar.

> ” *Samstarvið við Tjóðveldisflokkin er so slitið, at talan bert kann verða um tíð, áðrenn tað av álvara slitnar. Spurningurin er bert, nær tað slitnar, og ikki um tað slitnar*
>
> *Jørgen Niclasen, Dimmalætting 18. januar*

## Gott grundarlag

Løgmaður hevur ikki hug at gera viðmerking til ítøkiligu útsøgnina hjá sínum floksfelaga, sum er avgerandi 17. maður í løgtinginum, men hann viðgongur, at samgongusamstarvið er so mikið slitið gjøgnum fleiri ár, at annað lag má koma á.

– Nú mást tú ikki spyrja meg um, hvat Jørgen meinar. Vit hava eina samgongu, sum hevur eina avtalu, men eg skal vera tann fyrsti at viðganga, at tað eftir míni meining hevur verið ein turbulent tíð – bæði áðrenn og eftir valið. Tað er kanska ikki tann besti gróðrarbotnurin til konstruktivt arbeiðið, men eg haldi sanniliga, at vit hava ein góðan málsetning og eitt skilagott samgonguskjal, og vit skuldu havt allar fortreytir fyri at fingið nakað gott burturúr og fingið eitt fruktagott samstarv, sum verður frægari, sigur Anfinn Kallsberg.

Men tað hevur tíverri ikki eydnast so væl higartil, leggur hann afturat.

– Tað er greitt, at tað er ein fortreyt fyri at fáa nakað konstruktivt burturúr. So um ikki annað lag kemur á, og vit áhaldandi prioritera skeivt og brúka óneyðuga orku upp á slítandi ósemjur, so er spurningurin, hvussu leingi hetta heldur, sigur Anfinn Kallsberg.

> ” *Um ikki annað lag kemur á, og vit áhaldandi prioritera skeivt og brúka óneyðuga orku upp á slítandi ósemjur, so er spurningurin, hvussu leingi hetta heldur.*
>
> *Anfinn Kallsberg, Sosialurin 25. januar*

## Ókendur fundur

Um dagarnar var prát millum leiðandi persónar í Fólkaflokkinum og Sambandsflokkinum um eitt møguligt framtíðar samstarv, sum kortini ikki varð av nøkrum.

– Tað kenni eg onki til. Eg havi ikki verið í sambandi við nakran flokk ella nakran persón við tí fyri eyga at broyta samgongusamansetingina. Flokkurin er mannaður við ymiskum fólkum, og tað er ongin loyna, at tá turbulent viðurskifti eru millum flokkar, so rørist okkurt seg, og fólk tosa saman. Tað fái eg onki gjørt við, men mær vitandi er ongin samráðing farin fram, og sum formaður havi eg so ikki verið uppií, sigur Anfinn Kallsberg.

Anfinn Kallsberg váttar sostatt hálvavegna orðini hjá Jørgen Niclasen, at samstarvið við Tjóðveldisflokkin er í álvarsligum vanda. Men ongin ítøkilig ætlan er um at stinga í sekkin, sambært løgmanni.



# Royna telefon og útvarp í tunlinum

**Útvarpið og fartelefonin eru nú av og á at hoyra í undirsjóvartunlinum undir Vestmannasundi. Talan er um royndarkoyring**

ROYND
*Edvard Joensen*

Vágar: Tað ber til at hoyra Útvarpið undir Vestmannasundi. Eisini fartelefonin virkar. Viðhvørt.

Fólk, sum koyra undir sundinum, hava av og á kunnað ringt við fartelefon úr tunlinum í seinastuni. Eisini útvarpið hevur verið at hoyrt.

Niklas Foldbo, hjá partafelagnum Vágatunlinum, sigur, at talan er um at útgerðin nú verður royndarkoyrd. Tí kann ikki væntast, at sambandið er støðugt, men verður burtur av og á.

Hann sigur, at uppsetingin er liðug, men at tað fer at ganga ein mánaði ella so, áðrenn roknast kann við, at alt er endaliga komið upp á pláss.

– Av og á koyrir útgerðin, sum hon ætlandi skal, tá klárt er, Men so verður hon sløkt aftur, meðan ymiskar justeringar og kanningar annars fara fram, sigur Niklas Foldbo. Hann roknar við, at einaferð seinast í februar mánaða verður alt liðugt, og støðugt samband fæst inni í Vágatunlinum.

Vágatunnilin hevur seinastu tíðina verið stongdur um náttina mitt í viku, tí arbeitt hevur verið. Tó hevur borið til at koyrt í gjøgnum hvønn heilan tíma. Hetta fer at standa við í hvussu er hendan mánaðan út, sigur Niklas Foldbo. Okkurt arbeiði er at gera í tunlinum, og hidlið verður ikki ráðiligt at lata ferðsluna ganga frítt, meðan arbeitt verður.



*Útvarp og telefon hoyrast av og á í Vágatunlinum*

# Arbeiða við barnagarði í Hósvík

**Arbeitt verður við barnaansingini í Hósvík, sigur borgarstjórin. Hann væntar eina loysn í hesum valskeiðnum**

KOMMUNUMÁL
*Edvard Joensen*

Í Hósvík verður arbeitt við ætlan um bygging av barnagarði. Eingin endalig støða er tikin enn, men borgarstjórin væntar, at málið verður avgreitt í hesum valskeiðnum.

Um tað verður barnagarður, ella tað verður onnur loysn, sum vald verður, er heldur ikki fastlagt, men sum skilst á borgarstjór-anum i Hósvík, Jógvani Mørkøre, er ein barnagarður, tað, sum liggur eina fremst í ætlanini. Onkur er kortini, sum hellur eitt sindur til eina dagrøktarskipan, sigur hann.

Tað hevur verið at hoyrt millum fólk, at Hósvíkar Kommuna hevur samtylt at byggja barnagarð fyri fýra milliónir krónur, men tað er ikki so, sigur Jógvan Mørkøre. Eingin endalig samtykt er gjørd, leggur hann dent á.

Men hann váttar, at Hósvíkar Kommuna hevur víst áhuga fyri barnagarðinum í Hvalvík, sum kostaði eina fýra milliónir krónur, og tað kann vera haðani, tíðindini stava, heldur hann.

Sjálvurdylur hann ikki fyri, at hann heldur loysnina í Hvalvík vera sera hepna, og at hon væl kundi brúkst í Hósvík eisini.

Hósvík er bygd í vøkstri, og har eru nógv børn, sigur Jógvan Mørkøre, so eingin ivi er um, at tað er neyðugt við eini ansingarskipan.



*Borgarstjórin í Hósvík metir, at ein barnaansingarskipan, sum helst verður ein barnagarður, verður veruleiki í Hósvík í hesum valskeiðnum*

# Niels framvegis formaður í Føroya Kolvetni

OLJA
*Jan Müller*

Herfyri varð stovnað holdingfelag í Bretlandi við heitinum Faroe Petroleum við Graham Steward sum stjóra. Í hesum sambandi skrivaði Sosialurin í gjár, at Niels Sørensen er farin frá sum formaður í Føroya Kolvetni. Hetta er ein misskiljing. Niels Sørensen er framvegis stjóri í føroyska felagnum. Felagið í Bretlandi er eitt sjálvstøðugt felag. Graham Steward, sum er vorðin stjóri har, er um somu tíð farin úr nevndini í oljufelagnum Dana. Hann heldur tó fram sum formaður í Føroya Kolvetni.

# Kunningarfundur í Vágum

**Felagið Vágar fer at gera seg út til at taka í móti fólki, sum kemur í oynna, nú samferðslumøguleikarnir eru broyttir munandi við undirsjóvartunlinum. Kunningarfundur um handilsvirksemi í oynni verður hildin mikukvøldið**



*Felagið Vágar er farið undir miðvísa upplýsing um tað, sum hendir og fer at henda í Vágum, sigur Heðin Poulsen, formaður í Felagnum Vágar*

*Mynd: Edvard Joenen*

HANDILSVINNA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Felagið Vágar fer mikukvøldi á kunningarfundi í Miðvági at greiða handilsfólki í Vágum frá ætalnum felagsins í framtíðini.

Felagið Vágar sigur í tíðindakskrivi um dagarnar, at fundurin, sum hildin verður í húsum Vága Handverkarafelags í Miðvági, er bert ætlaður teimum, sum reka handil í oynni.

Har verður greitt frá, hvat felagið hevur á skránni í komandi tíð. Ein kunningarleiðari er settur, og sagt fer at verða frá, hvørjar ætlanir eru í tí sambandinum.

Heðin Poulsen, sum er formaður í Felagnum Vágar, sigur, at felagið miðar eftir at fáa størri og betri samstarv millum vinnurekandi í oynni, enn viðhvørt hevur verið. Ikki so at skilja, at fólk mótarbeiða hvørjum øðrum, sigur hann, men heldur tað, at tey vita ikki nóg væl av hvørjum øðrum, tá ymisk tiltøk eru.

– Tað er rættiliga skilagott at kunna samskipa lýsingar, útsølur og onnur tiltøk í øllum bygdunum, so tað ikki kemur upp á tvørs hvørt av øðrum.

Sama er sjálvandi galdandi fyri onnur feløg og fyritøkur í oynni, og hesum fara vit eisini at arbeiða fram í móti at náa, sigur formaðuriní Felagnum Vágar. Men tað verður ikki viðgjørt á hesum fundinum. Nú vera tað bara handilsfólkini, sum boðin verða á fund. Fundurin er ikki almennur.

Fundurin í Handverkarafelagshúsunum - tað er har, sum Rúsdrekkasølan leigar í kjallaranum - byrjar mikukvøldið tann 29. januar klokkan 19.30.

# Stovna stuðulsfelag í Vágum

**Fótbóltsstuðlar í Vágum fara nú at taka seg saman í felag, sum skal stuðla FS Vágum**

FÓTBÓLTUR

**Vágar:** FSV Vágar fær nú eftir ætlan egið stuðulsfelag. Stovnandi aðalfundur verður hildin sunnudagin.

Tað krevur nogv at vera í fyrstu deild í fótbólti. Nógvir pengar skulu til, og neyðugt er við góðum stuðuli bæði so og so.

Í Vágum hevur einki stuðulsfelag verið aftan fyri fótbóltsamtakið FS Vágar, men tað er ætlanin at fáa nú.

Í skrivi, sent er út í Vágum, heita stigtakarar-nir til stuðulsfelagið á Vágafólk um at møta mannsterk í høllini á Giljanesi sunnudagin klokkan 16.00 at stovna stuðulsfelag, sum skal stuðla FS Vágum bæði ítróttarliga og fíggjarliga í komandi kappingarári, nú felagið aftur fer at leika í fyrstu deild.

– Ynski og vón okkara er, at nógv fótbóltsáhugað møta til fundin, og at enn fleiri vilja gerast limir í felagnum, soleiðis at vit fáa eina samansjóðaða eind at stuðla FS Vágum bæði ítróttarliga og fíggjarliga, siga fyrireikararnir til stuðulsfelagið í Vágum í skrivi, sent er út í oynni.

**ej**